Vikuskiftis Sosialurin
Nr. 29 - 9. februar 2007

# Seinasta útkall til ÁRSINS

**Fram til mánamorgunin kunnu lesararar hjá Sosialinum vera við til at skjóta upp ÁRSINS MANN OG KVINNU og ÁRSINS KJAKVIRÐISLØN. Tað er Miðlahúsið, sum er stigtakari, og Føroya Banki stuðlar tiltakinum. Virðislønirnar verða latnar á samkomu í Miðlahúsinum hósdagin 15. februar kl. 15.30.**



ÁRSINS MAÐUR
&
ÁRSINS KVINNA
í Føroyum í 2006

HON og HANN, sum hava gjørt nakað GOTT fyri onnur, fyri síni næstu, sínar vinir, sínar grannar, sítt arbeiðspláss, sítt yrki, sína heimbygd, sítt land ella fyri eina ávísa søk, skulu nú veljast sum ÁRSINS MAÐUR og ÁRSINS KVINNA í Føroyum í 2006

Aftur í ár bjóðar Sosialurin øllum lesarunum, tvs. øllum Føroya fólki, at velja ársins mann og ársins kvinnu í Føroyum í 2006. Hetta verður afturvendandi tiltak á hvørjum ári. Fyrstu ferð var í 2005. Tá vórðu Leila Solmunde, forkvinna í Meginfelag Teirra Brekaðu, og Sofus Olsen, stigtakari til listasavn á Sandi, kosin ávíkavist ársins kvinna og ársins maður.

Vit lata fyrst og fremst tykkum lesarar gera av, hvat tit halda er besta orsøkin til ella prógvið um, hvør eigur heiðurin at gerast Ársins maður og Ársins kvinna í Føroyum í 2006.

**Men vit fara so eisini at leggja dent á hetta:**
Maður og kvinna, sum hava uppiborið hetta heiti, hava gjørt nakað GOTT fyri onnur menniskju, síni næstu, tað veri seg familju, vinir, grannar, starvsfelagar og fólk annars. Hesi kunnu eisini hava gjørt nakað GOTT fyri sítt nærumhvørvi, lokalsamfelagið og samfelagið sum heild, ella fyri eina søk, eitt ávíst felag ella felagsskap, eitt yrki ella eitt arbeiðspláss. Tað ber eisini til at skjóta upp fólk, sum tit halda hava gjørt nakað GOTT við at hava havt serstaka kveikjandi og hitandi ávirkan á onnur.

Veljið tykkara mann og kvinnu og grundgevið, hví hesi eru tykkara val!

Fyllið út lepan niðanfyri og sendið hann við brævbjálva til okkara: Miðlahúsið, Tórsgøta 1, ella Postsmoga 76, við merkinum: »Ársins maður í 2006« og »Ársins kvinna í 2006«. Tit kunnu eisini senda uppskot tykkara sum vanligt bræv. Eisini ber til at senda hetta sum teldupost til post@sosialurin.fo

Ein dómsnevnd við Jóhonnu á Bergi, stjóra á Faroe Ship, Andrasi Róin, samfelagsfrøðingi, Esther Djurhuus, pedagogi á Landssjúkrahúsinum, og Eyðuni Andreassen, fólkalívsfrøðingi, velur ársins mann og kvinnu millum mongu uppskotini. Vit loyva okkum eisini at prenta nøkur av uppskotunum við grundgevingunum í komandi bløðum.

**Freistin at lata inn uppskot er mánadagin 12. februar.**

Avdúkingin av ársins manni og ársins kvinnu í Føroyum í 2006 verður á samkomu í Miðlahúsinum hósdagin 15. februar kl. 16.00.

miðlahúsið
í Vágsbotni

FØROYA BANKI

Uppskot:
Grundgeving:
Navn:
Bústaður:
Bygd / býur:
Telefon:

MIÐLAHÚSIÐ · TÓRSGØTA 1 · BOKS 76 · FO-110 TÓRSHAVN · POST@SOSIALURIN.FO

### ÁRSINS MAÐUR OG ÁRSINS KVINNA Í FØROYUM Í 2006

HON og HANN, sum hava gjørt nakað GOTT fyri onnur, fyri síni næstu, sínar vinir, sínar grannar, sítt arbeiðspláss, sítt yrki, sína heimbygd, sítt land ella fyri eina ávísa søk, skulu nú veljast sum ÁRSINS MAÐUR og ÁRSINS KVINNA í Føroyum í 2006

Aftur í ár bjóðar Sosialurin øllum lesarunum, tvs. øllum Føroya fólki, at velja ársins mann og ársins kvinnu í Føroyum í 2006. Hetta verður afturvendandi tiltak á hvørjum ári. Fyrstu ferð var í 2005. Tá vórðu Leila Solmunde, forkvinna í Meginfelag Teirra Brekaðu, og Sofus Olsen, stigtakari til listasavn á Sandi, kosin ávíkavist ársins kvinna og ársins maður.

Vit lata fyrst og fremst tykkum lesarar gera av, hvat tit halda er besta orsøkin til ella prógvið um, hvør eigur heiðurin at gerast Ársins maður og Ársins kvinna í Føroyum í 2006.

Men vit fara so eisini at leggja dent á hetta:

Maður og kvinna, sum hava uppiborið hetta heiti, hava gjørt nakað GOTT fyri onnur menniskju, síni næstu, tað veri seg familju, vinir, grannar, starvsfelagar og fólk annars. Hesi kunnu eisini hava gjørt nakað GOTT fyri sítt nærumhvørvi, lokalsamfelagið og samfelagið sum heild, ella fyri eina søk, eitt ávíst felag ella felagsskap, eitt yrki ella eitt arbeiðspláss. Tað ber eisini til at skjóta upp fólk, sum tit halda hava havt serstaka kveikjandi og hitandi ávirkan á onnur.

Veljið tykkara mann og kvinnu og grundgevið, hví hesi eru tykkara val!

Fyllið út lepan niðanfyri og sendið hann við brævbjálva til okkara: Miðlahúsið, Tórsgøta 1, ella Postsmoga 76, við merkinum: "Ársins maður í 2006" og "Ársins kvinna í 2006." Tit kunnu eisini senda uppskot tykkara sum vanligt bræv. Eisini ber til at senda hetta sum teldupost til post@sosialurin.fo

Ein dómsnevnd mannað við Jóhonnu á Bergi, stjóra á Faroe Ship, Andrasi Róin, samfelagsfrøðingi, Esther Djurhuus, pedagogi á Landssjúkrahúsinum, og Eyðuni Andreassen, fólkalívsfrøðingi, velur ársins mann og kvinnu millum mongu uppskotini. Vit loyva okkum eisini at prenta nøkur av uppskotunum við grundgevingunum í komandi bløðum.

### Ársins kjakvirðisløn 2006

Aftur í ár verður ársins kjakvirðisløn latin. Miðlahúsið hevur tikið stig til hesa virðisløn, sum verður latin einum persóni, felag, felagsskapi ella stovni, sum hevur givið sítt góða íkast til at fremja samfelagsliga kjakið, ið er ein av grundarsteinunum undir fólkaræðinum.

Endamálið við at lata hesa virðisløn er eisini at menna og stimbra almenna orðaskiftið og gera tað meira fólksligt, professionelt og náttúrligt. Í fjør fekk Óli Petersen, teknari, virðislønina fyri við sínum tekningum og viðmerkingum at geva sítt góða íkast til samfelagsorðaskiftið.

Lesarar kunnu senda okkum uppskot til ársins kjakvirðisløn við at fylla út lepan og senda hann til Miðlahúsið, Tórsgøta 1 , 100 Tórshavn, ella tit brúka teldupostadressu okkara post@sosialurin.fo. Setið frámerki á: "Ársins kjakvirðisløn".

Ein dómsnevnd við Jón Brian Hvidtfeldt, útvarpsmanni, Karin Kjølbro, leiðaraá Kriminalforsorgini, Jóannesi Dalsgaard, deildarleiðara í Mentamálaráðnum, og Annleyg Lamhauge, deildarleiðara á Menningastovuni, ger av, hvør fær virðislønina .

# Til Onglands at vitja mostur

Tað gjørdist 9-ára gamla Jastrið Augustinussen úr Havn, sum vann Sudoku-kappingina her í blaðnum fyri januar mánað.

Vinningurin hesa ferð var ein flogferð fyri tvey frá Atlantic Airways, og Jastrið var ongan tíð í iva um, hvat ferðaseðlarnir skuldu nýtast til.

- Vit skulu til Onglands at vitja mostur mína, sum býr í Winchester. Tað høvdu vit longu ætlað frammanundan, men nú er ferðin so púrasta vís, heldur hon.

Tað var tó um reppið, at seðlarnir frá Jastrið og mammuni als ikki komu á Sosialin. Sunnudagin vóru nógvir januar-seðlar eftir, og Jastrið helt tá fyri við mammuna, at nú máttu tær í holt við at loysa gáturnar. Sjálv hjálpti hon eisini til, og tað var so við einum av hennara seðlum, at vinningurin varð dirgin heim.

Jastrid gongur í Kommunuskúlanum í Havn, og hon var sjálvandi errin, tá hon fór í skúla fríggjadagin.

**-mørk**




*Tað var ein bæði fegin og errin Jastrid Augustinussen, sum hósdagin kundi taka móti sjónliga prógvinum fyri, at hon hevði vunnið tvær flogferðir við Atlantic Airways*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Hvalur vakti stóran ans

Tað er sanniliga ikki á hvørjum degi, at ein grindahvalur verður skorin upp í Danmark, og nógv fólk vóru komin saman uttan fyri sjó- og fiskivinnusavnið í Esbjerg at hyggja, tá ein hvalur bleiv skotin upp har seinasta leygardag. Tey vórðu eisini væl kunnað um tilburðin, tí í sjónvarpinum bleiv fráboðað, nær hvalurin skuldi skerast upp.

Hvalurin varð funnin deyður á jútsku vesturstrondini. Tað er ikki óvanligt, at hvalir gera landgongd har, men lívfrøðingarnir halda, at hesin hvalurin var deyður, áðrenn hann kom inn á land.

Nú skulu serkøn gera ymsar kanningar av tí, sum fekst av hvalinum.

